# Greining av hagtølum um vinnufyritøkur

# fyri árini 1998-2003

Rakstrarúrslit hjá vinnufyritøkum, í mió. kr.




**Hagstova Føroya, november 2004**

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur

2. Gongdin í vinnuni

3. Tilfeingisvinna

4. Vøruframleiðsluvinna

4.1 Fiskavøruídnaður

5. Tænastuvinna

6. Samfelagsbúskaparlig lýsing

Greiningin er grunda á vinnuhagtøl og hagtøl úr tjóðarroknskapinum.

# 1. Inngangur

Henda greining av hagtølum fyri føroysku vinnuni umfatar árini 1998-2003. Hagtølini byggja á ársroknskapir við sundurgreiningum hjá fyritøkum. Roknskaparhagtølini sum eru grundarlag undir greiningini eru at finna á heimasíðuni hjá Hagstovuni.

Í greiningini verður fyrst hugt at vinnuni undir einum og síðani at hesum høvuðsbólkum:

- Tilfeingisvinna
- Vøruframleiðsluvinna
- Tænastuvinna

Í partinum um vøruframleiðsluvinnuna verður eisini hugt nærri at fiskavøruídnaðinum fyri tíðarskeiðið 1985-2003.

Seinasti parturin av greiningini er ein samfelagsbúskaparlig lýsing av vinnuni við støði í virðisøkingini, lønargjaldingum, og ársverkum í vinnuni.

Henda greiningin fylgir leistinum í tjóðarroknskapinum fyri geiran vinnufyritøkur og umfatar allar vinnufyritøkur undantikið einstaklingavirkir, sum er partur av húsarhaldsgeiranum og fíggjarfyritøkur sum eru partur av geiranum fíggjarfyritøkur. Virksemi hjá oljufeløgum á føroyska landgrunninum í leitingartíðarskeiðnum er ikki við í tjóðarroknskapinum og tí heldur ikki við í hesi útgávu. Í mun til tjóðarroknskapin er tó ein munur, almennir stovnar sum hava vinnuligt virksemi t.d. apoteksverkið og rúsdrekkasølan eru partur av geiranum vinnufyritøkur, men eru ikki við í hesi útgávu. Sí annars frágreiðing um hagtølini aðrastaðni á netsíðunum hjá Hagstovuni.

Fyri at geva eina neyvari mynd av virkseminum í einstøku vinnubólkunum og ikki at gera dupulteljingar, er úrslit av kapitalpørtum, t.v.s. dótturfeløg og atknýtt feløg, ikki tikið við í rakstrarúrslitið hjá vinnufyritøkunum.

# 2. Gongdin í vinnuni

Árið 2003 royndist ikki eins væl hjá føroyskum fyritøkum og tey undanfarnu. Hetta árið hevði vinnan samanlagt eitt hall eftir skatt sum var 32,1 mió. kr. tá úrslit av kapitaláhugamálum ikki verða tikin við. Árini frammanundan vóru munandi betri, í 2002 hevði vinnan avlop sum var 405,1 mió. kr., og besta árið í tíðarskeiðnum, í 2000, var avlopið 718,1 mió. kr.

Verður hugt nærri at vinnubýtinum, sæst at tilfeingisvinnan hevði eitt heilt vánaligt ár í fjør. Tilfeingisvinnan, sum umfatar landbúnað, fiskiveiði, fiskaaling og ráevnisvinnu, hevði eitt hall, sum var 501,7 mió. kr. Árið frammanundan hevði tilfeingisvinnan eisini hall, tá var tað 101,1 mió. kr. Frægasta árið í lýsta tíðarskeiðnum var 2000, tá vinnan hevði eitt avlop upp á 308,8 mió. kr.

Vøruframleiðsluvinna, sum fevnir um ídnað, orkuframleiðslu og byggivinnu, hevði tilsamans eitt avlop í 2003 sum var 170,9 mió. kr. Besta árið í tíðarskeiðnum var 2001, tá avlopið gjørdist 202,5 mió. kr.

Tænastuvinnan hevði á leið sama úrslit í 2003 sum árið frammanundan. Vinnan hevði í 2003 eitt avlop sum var 298,7 mió. og 307,9 mió. kr. í 2002. Besta árið hjá tænastuvinnuni var 2001, tá avlopið var 328,7 mió. kr.

*Mynd 1* niðanfyri vísir rakstrarúrslit fyri alla vinnuna samanlagt og fyri høvuðsbólkarnar í vinnuni.

Verður hugt at lyklatølum[1] hjá vinnuni sum heild, so sæst, at afturgongd hevur verið seinastu árini. Ognaravkastið hjá vinnuni samanlagt var 11,2 prosent í 1998, men hevur síðani verið minkandi alt tíðarskeiðið, og var í 2003 komið niður á 2,1 prosent.

**Mynd 1. Øll vinna, rakstrarúrslit**




**Mynd 2. Øll vinna, lyklatøl**




Eginpeningsavkastið í tíðarskeiðnum er minkað úr 26,6 prosentum í 1998, til 2,1 prosent í 2003. Trygdarevnini, sum eru eginpeningur í mun til samlaðu ognirnar hjá vinnuni, vóru í 1998 36,7 prosent ella ein góðan triðing av ognunum tilsamans. Trygdarevnini batnaðu í tíðarskeiðnum fram til 2001, tá tey komu upp á 41,5 prosent, men eru síðani versnaði nakað aftur, til 36,3 prosent í 2003. Gjaldførisevnini vísa gjaldførið hjá fyritøkunum í mun til stuttfreistaðu skuldina. Gjaldførisevnini batnaðu eisini tíðarskeiðið fram til 2001, tá tey fóru úr 143,9 prosentum upp í 151,5, men eru síðani versnað nakað aftur, til 126,1 prosent í 2003. *Mynd 2* omanfyri vísir gongdina fyri lyklatølini ognaravkast, eginpeningsavkast og trygdarevni fyri vinnuna samanlagt í tíðarskeiðnum.

## 3. Tilfeingisvinnan

Vánaliga rakstrarúrslitið hjá tilfeingisvinnuni er í høvuðsheitum orsakað av truplu støðuni í alivinnuni. Alivinnan hevði í 2003 eitt metstórt hall upp á 551,0 mió. kr. Alivinnan hevði eisini hall í 2002 og 2001, hesi trý árini hevur hallið í vinnuni tilsamans verði um 850 mió. kr. Hetta hevur gjørt, at eginognin hjá alivinnuni sum heild  er negativ, og at vinnan tí ikki er bótaført.

Verður hugt at fiskiveiðuni sæst, at fyri feskfiskaveiðuna royndist árið 2003 ikki eins væl og 2002, rakstrarúrslitið fór úr 107 mió. kr. niður í 62 mió. kr. Onnur fiskiveiða, sum millum annað umfatar flakatrolarar, rækjuskip, nótaflotan og annan fiskiskap undir Føroyum, hevði eitt hall í 2003, sum var 13,2 mió. kr. Í 2002 hevði vinnan eitt rakstraravlop upp á 65,1 mió. kr., og besta árið hjá aðrari fiskiveiðu var afturi í 1998, tá avlopið var 91,6 mió. kr. *Mynd 3* á næstu síðu vísir úrslitið av rakstrinum hjá størstu vinnugreinunum í tilfeingisvinnuni.

Verður hugt at roknskaparlyklatølunum fyri tilfeingisvinnuna sæst sama myndin. Ognaravkastið hevur verið minkandi í tíðarskeiðnum, úr 12,2 prosentum í 1998 og sum *mynd 4* vísir, var ognaravkastið fyri alla tilfeingisvinnuna sum heild negativt, -7,1 prosent í 2003. *Mynd 4* vísir eisini lyklatøl fyri eginpeningsavkast og trygdarevni.

[1] Hesi lyklatøl verða brúkt í greiningini: Ognaravkast=(Úrslit áðrenn rentur*100/ogn tilsamans); Rakstraravkast=(Úrslit áðrenn rentur*100/rakstrarinntøkur); Eginpeningsavkast=(Úrslit aftaná rentur, men áðrenn kapitalpostar*100/Eginogn); Trygdarevni=(Eginogn*100/Ogn tilsamans), Gjaldførislutfall=(tøkur peningur/stuttfreistað skuld). Rakstrarinntøkur umfatað nettosølu, goymslubroyting og aðrar inntøkur.

**Mynd 3. Tilfeingisvinna, rakstrarúrslit høvuðsbólkar**




**Mynd 4. Tilfeingisvinna, lyklatøl**




Verður aftur hugt at høvuðsbólkunum í tilfeingisvinnuni so sæst í *mynd 5* at ognaravkast fyri feskfiskaveiðu og aðra fiskiveiðu batnaði nakað fram til 2001, men er síðani minkað aftur. Alivinnan hevði í 2003 negativt ognaravkast sum var –34 prosent.

**Mynd 5. Tilfeingisvinna, ognaravkast høvuðsbólkar**




**Mynd 6. Vøruframleiðsluvinna, rakstrarúrslit**




# 4. Vøruframleiðsluvinnan

Vøruframleiðsluvinnan umfatar ídnað, byggivinnu og orkuframleiðslu.

Ídnaðurin hevði eitt heldur slakari ár í 2003 enn í 2002, avlopið var 102,0 mió. kr. í 2003 ímóti 124,9 mió. kr. árið fyri. 2001 var besta árið hjá ídnaðinum, hetta árið var avlopið 164,9 mió. kr.

Orkuframleiðsla hevði eitt avlop í 2003 upp á 33,0 mió. kr. ímóti 24,6 árið fyri. Besta árið hjá orkuframleiðsluni var afturi í 1998, tá avlopið var 39,1 mió. kr.

Byggivinnan sum er triði høvuðsbólkur í vøruframleiðsluvinnuni hevði eitt rakstraravlop, sum tilsamans var 35,9 mió. kr. í 2003. Besta árið hjá byggivinnuni var 2002, tá avlopið var 48,9 mió. kr.

*Mynd 6* omanfyri vísir rakstrarúrslitið hjá høvuðsbólkunum í vøruframleiðsluvinnuni fyri lýsta tíðarskeiðið.

Verður hugt at lyklatølunum hjá vøruframleiðsluvinnuni sæst, at ognaravkastið er minkað úr 11,6 prosentum í 1998 í 6,7 prosent í 2003. Eginpeningsavkastið er eisini minkað rættuliga nógv í tíðarskeiðnum, úr 22,8 prosentum í 1998 til 9,9 prosent í 2003. Trygdarevnini eru tó batnað, úr 43,5 prosentum í 1998 upp í 49,5 prosent í 2003.

*Mynd 7* vísir gongdina hjá lyklatølunum í vøruframleiðsluvinnuni fyri 1998-2003.

**Mynd 7. Vøruframleiðsluvinna, lyklatøl**




**Mynd 8. Vøruframleiðsluvinna, ognaravkast**




*Mynd 8* vísir ognaravkastið hjá høvuðsbólkunum í vøruframleiðsluvinnuni. Ognaravkastið er minkað fyri allar tríggjar høvuðsbólkar niður í góða helvt í tíðarskeiðnum.

Trygdarevnini hjá vøruframleiðsluvinnuni eru batnað fyri allar tríggjar høvuðsbólkarnar. *Mynd 9* vísir, at orkuframleiðsla er farin frá at hava minstu trygdarevni við byrjan til bestu trygdarevni við endan av tíðarskeiðnum.

**Mynd 9. Vøruframleiðsla, trygdarevni**




**Mynd 10. Starvsfólk í fiskavøruídnaðinum**




## 4.1 Fiskavøruídnaður

Í hesum parti verður hugt nærri at fiskavøruídnaðinum árini 1985–2003. Fiskavøruídnaðurin umfatar alla fiskaframleiðslu á landi t.v.s. fiskavirkir, laksasláturvirkir og fóðurvirkir. Beinleiðis samanberingar av uppgerðum fyri tíðarskeiðið áðrenn 1998 og aftaná kunnu kunna bert gerast við fyrivarni.

Fiskavøruídnaðurin hevur verið fyri stórari broyting síðani miðskeiðis í áttatiárunum. Starvsfólkatalið hevur verði fyri broytingum, virðisøkingin er nógv vaksin, og vinnan er sum heild er blivin betur konsoliderað.

Verður tikið støðið í talið á starvsfólkum, var fiskavøruídnaðurin nógv størsta vinnugreinin á landi í Føroyum í áttati- og nítiárunum. Á *mynd 10* er vísital fyri tal av starvsfólki fyri tíðarskeiðið 1985-2003. Starvsfólkatølini á myndini eru frá november mánað hvørt árið. Í 1985 var talið á starvsfólkið 3.242, fýra ár seinni, í 1989, var tað vaksið til 3.840, men minkaði so til 2.105 í 1993. Síðani 1994 vaks starvsfólkatalið hvørt ár fram til 2002 tá tað kom upp á 2.923, men er síðani minkað í 2003 til 2.795.

Fiskavøruídnaðurin var nógv merktur av búskaparkreppuni, árini 1991-1995, hetta sæst eisini aftur í, at talið á starvsfólki minkaði niður í nærum eina helvt frá 1989 til 1993. Í áttatiárunum arbeiddu eitt skifti 3.900 fólk í vinnuni, í ringastu kreppuárum bert 2.100.

Raksturin hjá fiskavøruídnaðinum í kreppuárunum var tungur, í tíðarskeiðnum frá 1988 til 1997 var hall nærum hvørt ár. Ringast vóru árini 1992 og 1993, tá halli var ávikavist 59 og 68 mió. kr.

*Mynd 11* vísir lyklatøl fyri, ognaravkast, rakstraravkast og trygdarevni hjá fiskavøruídnaðinum.

Ognaravkastið hjá fiskavøruídnaðinum, var størst trý tey síðstu árini í nítiárunum, tá var tað um 15 prosent. Restina av tíðarskeiðnum hevur tað ligið niðanfyri 10 prosent og kreppuárini um 2 prosent.

Rakstraravkastið hevur meginpartin av tíðarskeiðnum síðani 1985 ligið millum 2 og 6 prosent. Tað sæst í *mynd 11* at rakstraravkastið var óstøðugt í áttatiárunum, lágt í fyrru helvt av nítiárunum, og hevur síðani verið meira støðugt um 5 prosent.

Myndin vísir eisini at síðani 2001 er bæði ognaravkast og rakstraravkast minkað. Ognaravkastið er farið úr 13 prosentum í 2001 niður í 7 prosent í 2003 og rakstraravkastið er farið úr 6 prosentum í 2001 niður í 3 prosent í 2003. Hesi lyklatøl eru tískil farin niður í helvt eftir trimum árum. Tað er eisini vert at leggja til merkis, at ognaravkastið í 1998 var 17,5 sum er óvanliga høgt fyri fiskaframleiðslu og tað hægsta sum verið hevur síðani 1985.

Trygdarevnini vóru í 1985 10,6 prosent men versnaðu øll árini fram til 1992, tá var eginognin negativ og tí blivu trygdarevnini negativ við 2,6 prosentum. Aftaná kreppuna batnaðu trygdarevnini nógv, í 1998 vóru tey 40,9 prosent og hava síðani verði støðug.

**Mynd 11. Fiskavøruídnaður, lyklatøl**




**Mynd 12. Fiskavøruídnaður, fíggjarstøða**



Til seinast í hesum parti verður hugt at fíggjarstøðuni hjá fiskavirkjunum. *Mynd 12* vísir gongdina í fíggjarstøðuni hjá fiskavøruídnaðinum. Myndin vísir at samlaða skuldin nógv minkað síðani 1989 tá hon var størst. Tíðarskeiðið 1989 til 1997 minkaði skuldin úr 1.373 mió. kr. niður í 316 mió., men er síðani vaksin aftur til 822 mió. kr. við árslok 2003.

Býti millum langfreistaða og stuttfreistaða skuld er eisini broytt nógv, í 1989 var langfreistaða skuldin 956 mió. kr. hon minkaði árini fram til 1998, tá hon var komin niður á 154 mió. kr. og vaks síðani aftur til 220 mió. kr. við árslok 2003. Stuttfreistaða skuldin vaks árini fram til 1989, tá hon var 417 mió. kr., hon minkaði síðani niður til 114 mió. kr. í 1997. Árini aftan á 1997 er stuttfreista skuldin vaksin nógv og við árslok 2003 var hon komin upp á 602 mió. kr.

Eginognin hjá fiskavøruídnaðinum var í 1985, 82 mió. kr. hon vaks fram til 1987 tá hon var komin upp á 105 mió. kr. Síðani 1987 er hon nógv minkað og í 1992 var hon negativ við 25 mió. kr., síðani er hon vaksin á hvørjum ári fram til 2001 tá hon var 568 mió. kr., men er síðan minkað aftur til 527 mió. kr.

Samlaðu ognirnar hjá vinnuni fóru úr 1.400 mió. kr. í 1989 niður í 450 mió. í 1996. Høvuðs-orsøkin til hetta var, at langfreistaða skuldin minkaði úr 950 mió. kr. niður í 200 mió. kr. Síðani 1996 eru samlaðu ognirnar vaksnar aftur og eru nú á sama støði sum tær vóru í 1989.

## 5. Tænastuvinnan

Tænastuvinnurnar høvdu í 2003 eitt avlop upp á tilsamans 298,7 mió. kr. Tað var heldur lakari enn árið frammanundan tá avlopið var 307,8 mió. kr.

Verður hugt at einstøku vinnugreinunum í tænastuvinnuni, so var samlaða rakstrarúrslitið fyri handil og umvælingarvirksemi 235,1 mió. kr. í 2003, hetta var eisini frægasta úrslitið í tíðarskeiðnum. Í matstovu- og gistingarhúsvinnuni var samlaða rakstraravlopið í 2003 4,9 mió. kr. Úrslitið hevur alt tíðarskeiðið verði millum 3 og 8 mió. kr.

Ein av stóru vinnubólkunum í tænastuvinnuni er flutningur og samskifti. Hóast flestu tænastu-vinnurnar høvdu avlop, so hevði hesin vinnubólkurin eitt hall sum var 0,6 mió. kr. Nettosølan minkaði eisini nakað, úr 1.431 mió. til 1.407 mió. kr. Ringa úrslitið hjá hesum vinnubólki er í høvuðsheitum orsakað av, at farmaflutningur á sjónum hevði hall í 2003. Frægasta árið var 2001, tá úrslitið gjørdist 107,8 mió. kr.

Vinnubólkurin fastogn, útleigan og handilsligar tænastur hevði besta árið í 2003, avlopið var 46,9 mió. ímóti 41,3 mió. kr. í 2002. Aðrar tænastuvinnur høvdu eisini besta árið í 2003 við 12,3 mió., í 2002 var úrslitið 11,6 mió. kr.

*Mynd 13* vísir rakstrarúrslit fyri høvuðsbólkarnar í tænastuvinnuni. Sum tað sæst, stendur handil og umvælingarvirksemi fyri nógv størsta avlopinum í tænastuvinnuni. Tað sæst eisini, at lutfallsligi parturin av avlopinum hjá tænastuvinnuni er øktur nógv í tíðarskeiðnum. Vinnubólkurin vinnuligar tænastur hevði næststørsta avlopið í vinnugreinini í 2003. Í 2002 hevði høvuðsbólkurin flutningur og samskifti næststørsta avlopið av høvuðsbólkunum, men hesin høvuðsbólkur hevði hall í 2003.

Verður hugt at lyklatølum fyri tænastuvinnuna undir einum, sæst at ognaravkastið hevur verið minkandi alt tíðarskeiðið, í 1998 var avkastið 10,0 prosent, og í 2003 var tað komið niður á 7,3 prosent.

**Mynd 13. Tænastuvinna, rakstrarúrslit**




**Mynd 14. Tænastuvinna, lyklatøl**




Eginpeningsavkastið er eisini minkað nakað, úr 21,1 niður í 15,9 prosent, trygdarevnini í vinnuni vóru vaksandi fram til 2002 úr 40,2 í 1998 upp í 45,8 prosent í 2002, men eru síðani eftir einum ári minkað niður í 41,1 prosent, høvuðsorsøkin til hetta eru stórar íløgur, sum partar av tænastuvinnuni hava gjørt. *Mynd 14* vísir lyklatølini hjá vinnuni fyri tíðarskeiðið.

Verður hugt nærri at ognaravkasti hjá høvuðsbólkunum í tænastuvinnuni sæst, at avkastið hevur verið støðugt fyri allar høvuðsbólkarnar uttan flutning og samskifti, har avkastið er minkað úr 10,7 prosentum í 1998 og niður í 3,1 prosent í 2003. *Mynd 15* vísir ognaravkastið hjá høvuðsbólkunum í tænastuvinnuni.

**Mynd 15. Tænastuvinna, ognaravkast**




Trygdarevnini hjá tænastuvinnunum eru batnað í tíðarskeiðnum fyri flestu høvuðsbólkarnar. Tó eru trygdarevnini hjá høvuðsbólkinum, flutningur og samskifti á leið tey somu sum við byrjan á tíðarskeiðnum, í 1998 vóru trygdarevnini 33,9 prosent og í 2003 34,0 prosent, í 2001 tá tey vóru hægst vóru tey 50,5 prosent. At trygdarevnini eru minkað, er ikki so nógv tí at raksturin ikki gevur nøktandi avkast, men heldur orsakað av stóra lántøku í vinnuni til nýggjar íløgur.

**Mynd 16.  Tænastuvinna, trygdarevni**




*Mynd 16* vísir trygdarevni hjá vinnugreinunum í tænastuvinnuni. Tað er áhugavert, at hjá øðrum tænastuvinnum eru trygdarevnini batnaði úr 9,2 í 1998, upp í 26,4 prosent í 2003, og hjá vinnuligum tænastum, sum ikki er kapitaltung vinna, eru trygdaevnini versnaði úr 37,1 í 1998 niður í 29,8 prosent í 2003.

## 6. Samfelagsbúskaparlig lýsing

Í hesum partinum verður hugt nærri at vinnuni sum part av samfelagbúskapinum. Mát, sum brúkt verða í lýsingini, eru virðisøkingin hjá vinnuni, lønargjaldingar og tal á ársverkum.

Fyrst verður hugt at, hvørja tyngd teir tríggir høvuðsbólkarnir í vinnuni hava í mun til samlaðu vinnuna. Hetta verður rópt vinnubýti, og *mynd 17* niðanfyri vísir hetta fyri virðisøkingina.

Tilfeingisvinnan hevur ikki somu tyngd í 2003 sum við byrjan av lýsta tíðarskeiðnum, í 1998 var virðisøkingin hjá tilfeingisvinnuni góð 36 prosent av samlaðu virðisøkingini, og í 2003 var hon fallin til sløk 21 prosent.

Vøruframleiðsluvinnan hevði í 1998 út við 30 prosent av virðisøkingini samanlagt, í 2003 var hon vaksin til góð 35 prosent. Virðisøkingin hjá tænastuvinnuni var fyrst í tíðarskeiðnum góð 33 prosent og í 2003 var hon komin upp á 43 prosent. *Mynd 17* vísir vinnubýtið við støði í virðisøkingini.

**Mynd 17.  Vinnubýti, eftir virðisøking**




**Mynd 18,  Vinnubýti, eftir lønargjaldingum**



Lønargjaldingarnar kunnu eisini brúkast sum mát fyri støddina hjá teimum trimum høvuðsbólkunum í vinnuni. *Mynd 18* vísir vinnubýtið við støði í lønargjaldingunum í mun til samlaðu lønargjaldingarnar hjá vinnuni.

Lønargjaldingarnar hjá tilfeingisvinnuni vóru 29 prosent í 2003, í byrjanini av tíðarskeiðnum var parturin 37 prosent. Vøruframleiðsluvinnan hevði 31 prosent av lønargjaldingunum í 1998 og 34 í 2003, og tænastuvinnan hevði 32 prosent í 1998 og 38 prosent í 2003.

At enda ber til at hyggja at vinnubýtinum við støði í starvsfólkatalinum, mált í ársverkum. Gongdin í tali av ársverkum hevur verið meira støðug enn gongdin í virðisøkingini og lønargjaldingunum. Tó hevur lutfallsligi parturin av ársverkum eisini verið minkandi fyri tilfeingisvinnuna. Tað er áhugavert at leggja til merkis, at vøruframleiðsluvinnan hevur flest fólk í starvi av teimum trimum høvuðsbólkunum.

Í tíðarskeiðnum minkaði parturin hjá tilfeingisvinnuni úr 25 prosentum, niður í góð 21 prosent. Talið av ársverkum í vøruframleiðsluvinnuni var støðugt alt tíðarskeiðið, umleið 41 prosent. Tænastuvinnan hevði lutfalsliga størsta vøksturin í tíðarskeiðnum. Starvsfólkatalið í ársverkum vaks úr 35 upp í 38 prosent. *Mynd 19* niðanfyri vísir gongdina í tali av ársverkum.

Verður hugt at vinnufyritøkunum undir einum, sæst at fyritøkurnar høvdu stóran vøkstur í virðisøkingini fram til 2002, men at gongdin síðani vendi.

**Mynd 19. Vinnubýti, eftir ársverkum**




**Mynd 20. Vøkstur í virðisøking**




*Mynd 20* vísir vøksturin í virðisøkingini hjá vinnufyritøkum tilsamans. Virðisøkingini vaks nógv fram til 2001, tá kom vend í og í 2003 var stór minking. Í 2001 var vøksturin 15 prosent og tvey ár seinni, í 2003 minkaði virðisøkingin 10 prosent. Tað skal í hesum sambandi gerast vart við, at størsti parturin av minkingini í 2003 stavar frá, at alivinnan hevði negativa virðisøking sum var um 300 mió. kr.

Í mun til gongina í virðisøkingini vuksu lønargjaldingarnar og tal á ársverkum eisini í 2002, men í 2003 minkaðu lønargjaldingarnar góð 2 prosent og tali á ársverkum næstan eitt hálvt prosent.

*Myndirnar 21 og 22* á næstu síðu vísa vøksturin í ávikavist lønargjaldingum og ársverkum.

## Mynd 21. Vøkstur í lønargjaldingum




## Mynd 22. Vøkstur í ársverkum

